## Heimskendur málmaður vitjar í Havn

Í døgunum 12. og 13. mai skipar Fótbóltssambandið fyri málmansvenjaraskeiði, har hollendski málmansvenjarin Frans Hoek verður skeiðleiðari. Hann er víðagitin málmansvenjari og hevur verið venjari hjá bæði Ajax Amsterdam, FC Barcelona og hollendska a-landsliðnum. Síðani 1995 hevur hann starvast fyri UEFA og FIFA, og í næstum skal hann til Onglands at undirvísa Premier League-feløgum í málmansvenjing. Skeiðið er serliga ætlað venjarunum í Formuladeildini og 1. deild umframt vejarahópinum og instruktørunum hjá FSF. Harafturat verða eisini málmansvenjarar hjá feløgunum eisini við.

## Lítil spælitíð til klaksvíkingar

Fýra spælarar, sum fyri tað mesta hava spælt í KÍ, eru partar av besta hópinum í Fuglafirði. Men teir áttu ikki so ógvuliga stóran lut í stríðnum móti meistarunum úr B36.

Karstin Joensen vardi ÍF málið alla tíðina. Arnhold Joensen varð skiftur inn, tá ið tað restaðu tjúgu minuttir, og tá ið tað restaðu trettan minuttir, varð Julian Samuelsen settur á vøllin. Tórur Lervig kom ikki á vøllin.

ÍF-B36 1-3 (1-1)

# B36 aftur fulla last á langfaraveiðu

ÍF

B36

**Burðurin tykist vera tungur hjá fuglfirðingum, sum aftur hesa ferð høvdu meiri enn ilt við at fóta sær**



*Obi og teir í B36 vunnu aftur á útivølli og hava fingið fulla úrtøku burtur úr fyrstu umførunum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

ÍF-B36
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Tað gongur stútt sama vegin. Hjá B36 er kósin móti toppinum, og hjá ÍF er tað móti botninum. Eftir stórtapið í Gundadali móti HB, áttu fuglfirðingar heimavøll. Aftur hesa ferð stóðu teir yvirav havnarfelag. B36 var annað vikuskifti á rað í Eysturoy, og aftur hesa ferð fóru teir til hús við fullari úrtøku.

Leiktíðin er tvær ferðir trý korter. Hóast ÍF fyrstu løtuna megnaði at halda tørn og tóktist spæla upp við meistararnar, so kendist tað vera spurningur um tíð, áðrenn B36, sum støðugt legði stóran dent á verjupartin, fór til verka fram eftir vøllinum.

At ÍF hevði flutt Bartal Eliasen úr miðverjuni og fram í álopið bar eitt sindur av órógv við sær í B36 verjuna, og tað var eingin ivi um, at ÍF hevði størri tyngd í fremstu røð, enn teir høvdu næstsíðsta sunnudag, tá ið HB í Gundadali var á skránni.

ÍF fekk mál, tá ið 1. hálvleikur var gott og væl hálvrunnin. Eftir ÍF skjótálop og innlegg úr høgru frá Bartali Eliasen var B36 verjan ikki heilt sannførandi, og tá ið Atli Petersen brádliga stóð leysur, var hann kaldur og sendi framvið Jákupi Mikkelsen, sum annarsi ikki hevði so nógv at takast við.

Undan steðginum javnaði B36. Málskjútti var Fróði Benjaminsen, sum eftir tvey tey fyrstu umførini hevur víst, at hann er aftur í málsókna leiklutinum, sum hann so ofta áður hevur víst, men sum ikki var serliga eyðsýndur í fjør, tá ið B36 vann FM.

Mikkjal Thomassen sendi fríspark úr høgru og til handara stólpan, har landsliðsmaðurin var púra leysur, tá ið hann við høvdinum sendi umvegis graslíkið og í málið.

Eftir steðgin var tað eyðsýnt, at B36 hevur størri breidd og tyngd enn ÍF. Fuglfirðingarnir vístu vilja at vera tættari og stinnari í nærdystunum, men teir hava ikki somu manningarligu fyritreytir, sum B36 hevur tað. Hjá meistarunum ber til at skifta fólk, uttan at tað órógvar nakað sum helst. Tað ber ikki til hjá fuglfirðingum.

Meistararnir fingu týdningarmikla 2-1 málið, tá ið seinna umfarið var tíggju minuttir gamalt. Málskjútti var gamli kenningurin í Fuglafirði, Sylla. ÍF málverjin var á veg út eftir bóltinum, sum B36 hevði lagt innfyri úr vinstru, men Sylla var fyrri á og stýrdi við høvdinum bóltin í tóma málið.

So bant B36 um. Teir høvdu fingið tað, sum teir vóru komnir til Fuglafirðar eftir. Tað ráddi fyrst og fremst um, at ÍF ikki skuldi fáa mál, og tað eydnaðist væl hjá B36 at binda fyri. Um sigurin skuldi gerast størri enn eitt mál, so fór talan at verða um eykavinning. Hann fingu teir í árstalsfelagnum, tá ið tað restaði eitt korter. Hanus Thorleifsson skoraði fyri fyrstu ferð í landskappingini, síðani hann fór úr Skála blusuni og í B36 troyggjuna, tá ið hann av brotsteigarmarkinum sendi móti málinum. ÍF málverjin varð snýttur, tí bólturin tók í ein á vegnum.

## Hugburðurin batnaður

Høgni Zachariassen, ÍF liðformaðurin, ásannar, at tað kennist lítið hugaligt einki stig hava fingið eftir tvey umfør:

– Vit hava spælt móti HB og B36, og næstu ferð er EB/Streymur á skránni. Tað eru harðar treytir. Vit eru ikki nøgdir við einki stig at hava fingið. Tað positiva hesa ferð var, at hugburðurin var væl betri, enn hann var móti HB. Munurin var ikki so stórur, men B36arnir vóru tolnir, og teir hava kvalitetirnar at bíða eftir tí, sum teir vóru komnir eftir, staðfestir ÍF liðformaðurin.

## Málið órógvaði eitt sindur

B36 málverjin helt, at tað órógvaði eitt sindur, at ÍF fekk fyrsta málið:

– Ætlanin hjá okkum var at seta alt upp á pláss sum skjótast. Sum heild gekk tað væl. Vit vóru ikki skelkaðir, men tað kendist, at ÍF fekk fyrsta málið. Umframt skotið hjá Atla Petersen høvdu teir eina roynd móti málinum. Eg var mest sum arbeiðsleysur, og í 2. hálvleiki var ongantíð ivi um, at vit fóru at vinna, heldur Jákup Mikkelsen.

*Tit løgdu ikki so nógv fyri í álopspartinum í 2. hálvleiki?*

– Um vit ikki gjørdu tað, so var tað ikki tilvitað. Vit høvdu ongar ætlanir um, og tað var ikki neyðugt hjá okkum, at leggja okkum aftur á vøllin, sigur Jákup Mikkelsen, sum roknaði við, at ÍF fór at flyta Bartal Eliasen longri aftur á vøllin, tá ið teir vóru komnir á odda.